VIÐMERKINGAR

# Når nøden er størst, kan man også regne med Gud!

**Mogens Tilsted Christensen**
*sognepræst*



Torsdag den 7. april 2005 kørte min hustru og jeg mod Tórshavn, vi skulle nå en færge til Danmark på ferie. Vejen var denne dag spejlglat og jeg forsøgte at køre forsigtigt efter forholdene.

**Referat/vidnesbyrd:**

Vejen, vi kører på denne kolde aprildag, går lidt ned ad bakke omkring pynten ved et fjeld nær Hósvík. Pludselig dukker en truck op om hjørnet på pynten ca. 100 meter fremme i svinget. Den er i min kørebane med front imod vores vogn. I den modsatte kørebane på den »smalle« tosporede vej ses en bil lige ved siden af trucken og spærrer for vejen. Det ser i første omgang ud som om, trucken vil overhale bilen. Bag ved den »modkørende« bil kommer en bil mere kørende på den isglatte vej.

Forundret og chokeret forsøgte jeg at bremse, men vognen skred på is-vejen, og det var helt umuligt at bremse og standse op og undgå de blokerende biler på vejen.

I brøkdele af sekunder skal jeg som fører tage stilling til:

*1. om jeg vil køre ind i trucken og blive smadret og risikere lemlæstelse af flere mennesker i og omkring vognene,*

*2. om jeg vil køre ud i rabatten i højre side og smadre bilen imod fjeldsiden med risiko for stor skade på mennesker, fordi der ikke var plads mellem trucken og fjeldet,*

*3. om jeg vil køre venstre om det hele med risiko for at trille i Atlanterhavet med bil og hustru,*

*4. eller om jeg vil risikere et forsinket brag med den »modkørende« bil i modsatte kørebane og håbe på, at det var muligt at komme imellem personbilerne og trucken og køre gennem »nåleøjet«.*

Afstanden mellem truckens bagende og den modkørende bil var så smal, at man ikke med de blotte øjne kan bedømme den anderledes end, at der ingen afstand er. Efterhånden, som jeg kommer frem, opdager jeg til min gru, at alle bilerne holder stille efter en forudgående ulykke på stedet. Jeg bliver endnu mere chokeret, for den modkørende bil kommer jo ingen vegne og kan nu ikke komme uden om trucken, så jeg kan håbe på at komme igennem, når den er kommet forbi. Vores bil glider nu magtesløs ned af den isglatte lidt skrånende vejbane på den yderste fjeldside på vej til færgen og ferie i Danmark, mens vejen på netop dette sted er blokeret.

I en sådan situation kan intet menneske nå at tænke eller handle hurtigt nok. Jeg ser nu for mig og frygter, at nu går det forfærdeligt galt.

Men i løbet af de få sekunder, hvor bilen kurede på den isglatte vej imod de 3 biler på den smalle vej, gjorde jeg det, som dette emne handler om. Jeg råbte på Jesus, og bad om hjælp.

I disse brøkdele af sekunder må der have været en engel, der tog over og styrede bilen på is-vejen mellem nåleøje-pladsen mellem de blokerende 3 vogne på vejen.

Her hjalp bremser intet, bilen kurrede hen ad isen. Men ABS var måske en medvirkende hjælp. Men først og fremmest var det Gud, der hørte mit nødråb.

Selv under normal føre ville det være uforsvarligt at forsøge at komme igennem de holdende biler med en fart på over 40 km/t..

Efter min mening var hjælpen hverken ABS eller chaufføren.

Hjælpen kom ene og alene fra Gud. Lynopkaldet (råbet) til Jesus blev hørt, og hjælpen kom i løbet af brøkdele af sekunder. Herefter kunne chaufføren og ABS lade sig bruge.

Jeg forsøgte så godt jeg kunne med ABS-bremserne at manøvrere bilen ind imellem de holdende biler. Og så lød et knald.

Sidespejlet havde ramt modpartens sidespejl på den ene bil. En chokerende oplevelse, men ud over chokket, skete der ikke andet end, de to sidespejle blev vippet ind, som det sker, når bilen skal i vaskemaskine.

Anna og jeg var rystede.

Jeg kunne ikke uden videre køre tilbage og drøfte forholdene med bilisterne, fordi vi i det glatte føre skulle nå en færge i Tórshavn ca. 30 km. længere fremme en halv time senere. Færgen sejler kun en gang om ugen til Danmark. Farten kunne ikke med rimelighed overstige 50 km/t. i dette føre.

Jeg ringede i stedet efterfølgende til politiet og fortalte, hvem jeg var, og hvad der var sket og hvordan, så evt. chokerede mennesker med evt. skramme på sidespejl kan vide, hvem der drønede forbi i det glatte føre uden at stoppe op og hvorfor. Politiet meddelte ved min henvendelse, at der kort tid forinden var sket en ulykke på dette glatte sted. Der var heldigvis heller ikke ved dette forudgående uheld sket skade på mennesker.

Tæt på? Ja mon ikke. Det nytter noget at bede.

Tak Jesus.

Kig ind på www.teologen.dk <http://www.teologen.dk>

# RÆKJUSTUÐUL OG RÁFISKAGRUNNURIN

**- hava vit onki lært av 80'unum ? (1:3)**

**Kristina Háfoss**



13 sigst at vera eitt tal, ið elvir til óeydnu - og staðfestast kann at nú 13 ár eru liðin síðan bankakreppan í 1992 tók veruligt dik á seg í Føroyum, er politiska skipanin við at gera júst somu feilir aftur.

**Ráfiskagrunnurin 1975**

"Landsstýrið leggur við hesum fram fleiri lógaruppskot, ið miða ímóti at lætta um ta trongstøðu, sum fiskivinnan er komin í av ymsum orsøkum." Orsøkirnar eru m.a."hækkandi oljuprísir"..."lækkandi fiskaprísir"...v.m. Nú skuldi tú kanska hildið at talan er um viðmerkingar til lógaruppskotið um at lata rakstrarstuðul til rækjuvinnuna, tí talan er um nærum júst tær somu grundgevingarnar. Talan er tó um grundgevingar til lógaruppskotið um Ráfiskagrunnin í 1975.

Stovnanin av Ráfiskagrunninum var m.a. eitt úrslit av eini bráðfeingis stuðulsskipan, ið skuldi umfata útróðrarflotan, men sum kunnugt seinni kom til at fata um allan flotan. Úrslitið av hesum kenna vit alt ov væl, og tíverri er nógv, ið bendir á, at vit eru á veg á somu vandakós.

**Rækjustuðulin 2005**

Hósdagin 21. apríl 2005 legði Landsstýrið fram lógaruppskot á Løgtingi, har mælt varð Løgtinginum til aftur at fara undir beinleiðis vinnulívsstuðul. Hesuferð verður byrjað við rækjuvinnuni. Grein 1 í lógaruppskotinum er soljóðandi: "Landsstýrismanninum verður heimilað at veita rækjuskipum endurgjald fyri eykaútreiðslur og mista fiskitíð. Heimildin verður veitt, tí rækjuskipini stríðast við høgar oljuprísir, lágar rækjuprísir, stongdar havnir í Kanada o.a." Grundgevingarnar eru nærum júst tær somu, sum tá farið var undir Ráfiskagrunnin í 1975, og eru so mikið almennar, at allur fiskiflotin átti at fingið rætt til sama stuðul. Allur flotin stríðist jú við høgar oljuprísir, lágar fiskaprísir o.a.

**Føroya Reiðarafelag vil hava almennan studning til øll skip**

Greitt er undir øllum umstøðum, at nú fara aðrir partar av flotanum sjálvsagt at leggja alstóra orku í at vinna somu sømdir frá Føroya Landsstýri og Løgtingi, sum rækjuvinnan hevur fingið. Tá rækjuvinnan fær endurgjald fyri høgar oljuprísir, hví skulu aðrir skipabólkar, handlar og virkir á landi, umfram øll húsarhald ikki eisini fáa endurgjald fyri hetta?

Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag sendi eisini sunnukvøldið (24.04.2005) politikarunum eina heilsan í sendingini Ekkó í SVF, har hann rósti politikarunum, ið fóru undir Ráfiskagrunnin í 70'unum, og har hann bað núverandi politikarar umhugsa at geva øllum teirra skipum almennan studning vegna høgu oljuprísirnar. Um rækjuflotin fær - hví so ikki øll skipini hjá Føroya Reiðarafelag? Eitt er púra greitt, at hava politikarar ikki rygg til at standa ímóti hesum, so vil ein nýggjur "Ráfiskagrunnur" - bara í øðrum líki - skjótt síggja dagsins ljós.

**Hvør politikari hevur rygg til at avtaka rækjustuðulin um 2 ár?**

Sagt verður víðari í rækjustuðuls-lógaruppskotinum at latnar verða 10 mió. kr. árliga í tvey ár - tvs. íalt 20 mió. kr. til tey 5 rækjuskipini. Skipini fáa sostatt 4 mió. kr. í part. Dentur verður lagdur á, at talan bert eru um tvey ár, men hvør politikari hevur rygg til at avtaka skipanina um tvey ár? Ikki er nógv, ið bendir á, at rækjuprísirnar fara upp, ella at oljuprísirnir fara niður, í bræði - og tí stendur sólarklárt, at rækjuvinnan sum vit kenna hana í dag, ikki fer at bera seg.

**Enn eitt syrgiligt studnings-ævintýr á veg?**

Vit gjørdu nógvar feilir í 80'unum, men tað skal nú vísa seg um vit hava lært nakað av hesum.

Tað skal vera mín vón, at Løgtingið broytir støðu við 2. og 3. viðgerð av lógaruppskotinum um rækjustuðul, ið annars verður byrjanin til enn eitt studnings-ævintýr, ið øll vita hava ein syrgiligan enda fyri Føroya land og fólk.

# Húsastuldur staðfestur við dómi

**Annfinn Hansen**

Dómur í Føroya rætti tann 29. Nov. 2004 sak nr. BS 1533/2002. Viðv. Tvingsilssølu 20. okt. 1994 matr. Nr. 20c í Fuglafirði, sethúsini hjá Bjørg Hansen, serogn sambart hjúnarsáttmála.

Her verður víst til ein av rættar viðmerkingunum í dóminum hjá Føroya rætti.

"*Det må lægges til grund, at Bjørg Nanny Hansen var ejer af matr. Nr. 20c, i Fuglefjord, og at der således, uanset at der efter fogedbogen var Annfinn Hansen der anviste ejendommen til udlæg, ikke kunne foretages udlæg i ejendommen på grundlag af Annfinn Hansen gældsbrev og uden at Bjørg Nanny Hansen var indkaldt eller til stede.*

Seinast nevnda váttar, at tað varð Fútarætturin, sum tann 21. Mars 1994 gjørdi úttøku í sethúsaognini hjá Bjørg, sum er tann stóri lógarbrótarin.

Ì samband við dómsviðgerðina, loyvi eg mær at vísa til "forvaltningsloven"

*Forvaltningsloven kapitel 2 indeholder nærmere bestemmelser om inhabilitet for de personer, der virker i den offentlige forvaltning. Den, der er inhabil i forhold til en sag, må ikke træffe afgørelse, deltage i afgørelsen eller i øvrigt medvirke ved behandling af den pågældende sag, jf. lovens § 3, stk.2*

Tað skal sigast at lógarbroti av Fútarættinum við úttøku tann 21. mars 1994 og inhabilitet undir dómsviðgerðini er staðfest við dóminum tann 29. Nov. 2004.

Saksøkti, P/F Føroya Banki sigur í dóminum: "*At Annfinn Hansen ikke havde skriftlig fuldmaget fra Bjørg Hansen i fogedretten, er ikke udsædvanligt. Det blev ikke praktiseret i fogedretten på det tidspunkt." Banken kan ikke gøres ansvarlig for fogedrettens fejl.*"

Dómurin staðfestir eisini, at P/F Føroya Banki hevur lagt eitt ólógligt krav fram mótvegis Bjørg úttøkudagin tann 21. mars 1994. Sambart rættarmálsskriv fastheldur bankin skuldarkravi heilt fram til juni 2003, tá bankin váttar at Bjørg Hansen ikki hevur skylda bankanum pening.

At P/F Føroya Banki hevur gjørt misbrúk av støðuni sum valdaði í Føroya Fútarætti í áður nevnda tíðarskeiði, er helst einki at ivast í, men hvar varð rættartrygdin ?

At fyrv. Sorinskrivarin miðskeiðis í 90-unum manglar starvsfólk, tá kreppan varð uppá tað mesta, er eingin umbering.

Hvar er moralska/etiska skyldan hjá P/F Føroya Banka í hesari sak, kann bankin liva við hesum lógarbroti?

Húsastuldurin kemur framyvir at hanga sum ein tungur skuggi yvir P/F Føroya Banka. Umdømi og trúvirði bankan´s er so mikið skaða, at tað neyvan gerst verri enn tað er í løtuni.

Bankalógin heimilar ikki persónum, at manna bankan ið skaða umdømi bankans.

Spurningurin er so hvat eigarin av P/F Føroya Banka, Fíggjargrunnurin frá 1992, sigur um hesi viðurskiftir?